


*Jón Tyril er oddamaður fyri Sp/F G!-Festivalin, men minnir á, at í sáttmálanum við Grót eru eisini skyldur, sum fylgja við. 2000 tjaldingarpláss vera í ár, og eisini gøtufólk og leirvíkingar vilja uppliva G! í tjaldi*
*Mynd. Jens Kr. Vang*

# G! skal geva góð upplivilsi

**G!-Festivalurin er í nánd, og fyrireikarnir hava úr at gera. Høvuðsfyriskiparin, Jón Tyril, vísir aftur, at kritikkurin av skránni bara hevur verið neiligur, og fegnast um stuðulin úr Gøtu.**
**– Tilsamans koma vit at brúka eini 1300 tímar bara til vaktarhald, sigur Jón Tyril um ta nógvu orkuna, sum krevst til tiltakið**

G!-FESTIVALURIN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

– Ja, nú er eitt sindur rokaligt, sigur ein skundmikil, men altíð vælorðaður Jón Tyril, tá vit spyrja hann, hvussu skilið er í Gøtu, nú hol er sett á G!-vikuna.

Skrokkarnir til pallarnar eru settir upp, og sum Jón Tyril sjálvur kallar tað, so fara ætlaninirnar nú av skriviborðinum og umsetast til veruleika.

Jón Tyril greiðir frá, at síðan 1. februar hava fimm fólk arbeitt fulla tíð við at fyrireika festivalin, og nu eru enn fleiri komin við. M.a. eru eini 20 sonevndir økisformenn settir, ið fáa samsýning, sum hvør í sínum lagi hava ábyrgd av at samskipa tær ymsu uppgávurnar á einum so stórum tiltaki, sum G!-Festivalurin nú er blivin. Sum festivalurin nærkast er nógv nevniliga brúk fyri fleiri góðum kreftum, og Jón Tyril metir, at eini 100 fólk frá m.ø. GÍ og NSÍ hava verið við til at fyrireika pall og annað.

– Tilsamans koma vit at brúka eini 1300 tímar bara til vaktarhald, sigur Jón Tyril um ta nógvu orkuna, sum krevst til alt tiltakið.

– Tað besta av øllum er, at øll bygdin er við, sigur høvuðsfyriskiparin, sum letur væl at hjálpseminum í Gøtu. Jón Tyril sigur, at hetta ger, at uppgávurnar verða loystar bógv betur enn annars. Eisini eru viðurskiftini sera góð nú, eftir at tað var eitt sindur kalt tey fyrstu árini millum G!-Festivalin og ymisk áhugafeløg í økinum.

## G! er ikki public service

Spurdur, um tað hevur ein trupulleiki, at eitt sindur av kritikkinum av festivalinum hevur verið, at fólk ikki siga seg kenna bólkarnar nóg væl, sigur Jón Tyril, at sum so kennir tann breiða fjøldin neyvan heldur Lenny Kravitz, men at hetta ikki er nakar trupulleiki.

Hann sigur seg harmast, at tá hann herfyri var gestur í Degi og viku, bara kom fram, at neiligur kritikkur hevur verið av G!-Festivalinum.

– Vit hava eisini fingið positivar afturmeldingar, og tær fylla nógvar ferðir meira, sigur Jón Tyril.

Spurdur, um G!-Festivalurin er eitt slag av tónleikaligum public service til føroyingar, sigur Jón Tyril, at tað er hann so avgjørt ikki. Hann metir tað vera eitt gott tekn, at so nógv kjakast um skránna.

– Skúlin skal uppala fólk. Ikki vit. Vit vilja geva fólki nøkur góð upplivilsi, sigur fyrireikarin, og heldur fyri, at skráin á G!-Festivalinum skal vera merkt av dygd, fjølbroytni og gjarna nýggjum og viðkomamndi tilfari fyri fólk.

Spurdur, um hann hevur nøkur serlig ráð til fólk, ið ætla sær á G!-Festival, sigur Jón Tyril tað vera týdningarmikið, at vera opin og spíla oyruni út, tí har kemur væntamdi ein fjølbroytt fjøld av fólki, og ikki minst nógv stuttlig fólk.

## Luftbrúgv til G!

Eitt av høvuðsnøvnum í ár er Kaizers Orchestra úr Noregi, og er hetta helst fyrstu ferð í Føroyum, at ein bólkur verður flogin til Føroya á einum sertúri, sum bara er til og frá festivalinum. Um mjørki verður í Vágum hósdagin, og flogfarið ikki lendir, noyðast tríggir bólkar at melda avboð til G! í ár. Jón Tyril, at tey einki alternativ, um hetta skuldi hent, men at hetta eru treytirnar, tá tú skipar fyri tílíkum í Føroyum.

– Kaisers Orchestra er eitt perfekt festivalorkestur, og hetta er einasti máti, tí teir hava eina tronga skrá, sigur Jón Tyril.

## Gøtufólk búgva í tjaldi

Í fjør vóru 750 tjaldingarpláss á G!, og tá var útselt. Í ár vórðu í fyrsty syftu 1500 tjaldingaratgongumerki prentað, og tey vórðu øll útseld. Síðani vórðu 500 prentað afturat, og enn eru nøkur eftir av teimum.

– Fyri nógv er tjaldingin hæddarpunktið á festivalinum, og gøtufólk og leirvíkingar keypa eisini tjaldpláss, fortelur Jón Tyril.

Í ár verður frítt útsýni frá vegnum oman á sandin. Har hava annars básar staðið undanfarin ár. Í ár verður grillpláss, har Uni Gullfoss, kokkur, fer at steikja lamb.

Jón Tyril viðgongur, at matstøðini helst hava verið undirmett undanfarin í ár, og at størri dentur verður lagdur á hetta í ár. Somuleiðis skulu tey saniteru viðurskiftini betrast.

Eftir at broyting er gjørd í rúsdrekkalógini, sum loyvir skeinking á størri tiltøkum, ber til at skeinkja úti, og hetta fer fram á tvinnum støðum á G! –Festivalinum, m.a. á tjaldingarplássinum.

## Sp/F G!

Spurdur, um tað hevur ávirkað fyrireikararnar, at tey fingu mentanarvirðisløn M.A. Jacobsens, sigur Jón Tyril, at hetta ikki hevur hvat beinleiðis ella tilvitaða ávirkan.

– Men øll vóru glað tá, og hetta hevur helst verið til at skapa áhuga.

Í mun til áður er G!-Festivalurin nú vorðin eitt smápartafelag, og hetta metir Jón Tyril, sum nú stendur fyri festivalinum, vera eitt framstig.

– Fyrr kundi tað vera eitt problem, at alt var til diskussión, og tú visti ongantíð, um fólk lupu frá, ella um onkur kom inn og kollvelti alt. Vit hava fingið ein nýggjan struktur, men tað verður ikki vist, at tað verður eg, sum haldi fram, sigur ein varin Jón Tyril, og minnir á, at í sáttmálanum við Grót stendur, at hann hevur skyldu at gera tað besta fyri festivalin.

– Ábyrgdarbýtið er vorðið greiðari, staðfestir oddamaðurin á G!.

## Ólavsøkan gav íblástur

Eitt orð sum gongur aftur og aftur, tá tú tosar við Jón Tyril er "upplivilsi", og definitiónin hjá G! upp á ein festival er "tað samlaða upplivislið!"

– Vit vilja gjarna, at fólk fáa eitt gott upplivilsi, góðan tónleik, góðan mat og merkja, at vit hava gjørt okkurt serligt burturúr.

Sum nakað nýtt verður í ár skipað fyri tí stóru sangløtuni á midnátt leygarkvøldið við m.ø. Nikolinu av kamarinum, Anniku Hoydal, Martini Joensen og Eivør Pálsdóttur.

– Vit hava fingið íblástur frá midnáttarsanginum á ólavsøku og sing along aðrastaðni frá, sigur Jón Tyril, og heldur at við hesum hava tey savnað nøkur av teimum bestu sangskrivarunum og tónleikarunum í Føroyum at framføra undir virðiligum umstøðum, har einstaklingurin og tann føroyski sangskatturin verður settur í miðdepilin, sum Jón Tyril tekur til. Hetta heldur hann eisini vera rættiliga "føroyskt".

– Vit definera eina góða veitslu ella eitt gott brúdleyp eftri, hvussu væl sangurin gekk, og tað hendir ikki nógva aðrastaðni í verðini, sigur Jón Tyril.